# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1938.
# Tíðarskeið: 4/9-11/9 - 2019

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, Ian Salter, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, hýsu og mathøgguslokki varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu, longu og blálongu. Ian Salter tók prøvar av sjógvi til sínar kanningar av e-DNA. Nebbasild, hvítingsbróðir og svartkjaftur varð tikin til fuglakanningar á Havstovuni.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Útgerð til eDNA kanningar. Miniloggarar til at máta temperatur á trollemmunum.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 4/9 kl 21:15. Tóku støðir hósdagin í norðara/eystara parti av bankanum og fríggjadagin mitt á bankanum. Fríggjadagin og sunnudagin tóku vit støðir í vestara kanti. Hinar dagarnar tóku vit støðir suður/vesturi á bankanum og endaðu aftur í landnyrðinghorninum. Tóku allar 29 fiskistøðirnar. Allar 12 CTD-støðirnar vórðu tiknar og umframt vórðu 15 eyka CTD-støðir tiknar í samband við kanningarnar av eDNA. Veðrið var sera gott allan túrin. Vóru á Havnini týsdagin kl. 07:00 og landaðu til Barðið.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av toski og upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 10. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og lagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit (Talva 1, Mynd 1):** Tað var meira at fáa av toski enn seinastu 15 árini, og nærkast nøgdin tí, sum fyrr var vanligt. Hetta var toskur av øllum støddum og ikki bert sera stórur toskur eins og vanligt plagar at vera. Tað var sera nógv til hýsu, tað sama sum í fjør og líka nógv sum metárið 2002. Hetta var hýsa í øllum støddum. Tað var nógv til av longu og havtasku í mun til onnur ár. Tað var lítið til av upsa (Mynd 1), mathøgguslokki og gulllaksi. Nøgdin av silvurmurti og glýsufiski øktist nógv, eftir at nøgd av toski, hýsu og upsa minkaði í 2005, men er nú komin niður á eitt vanligt støði. Magakanningarnar vístu, at tað var lítið til av smáari nebbasild, men nakað til av miðalstórari nebbasild. Nøgdin av krabbdýrum var sera lítil.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1938 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| FISKASLAG | KG í 2019 | Nytrur | Magar | KG í 2018 | Lutfall 2019/2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 34518,612 | 410 | 102 | 34541,393 | 1,00 |
| HAVMÚS | 3138,126 | | | 1195,971 | 2,62 |
| TOSKUR | 2347,311 | 249 | 66 | 430,630 | 5,45 |
| LONGA | 799,399 | 54 | 2 | 95,845 | 8,34 |
| SVARTKJAFTUR | 622,025 | | | 312,695 | 1,99 |
| HVÍTINGUR | 607,331 | | | 175,293 | 3,46 |
| GULLLAKSUR | 578,536 | | | 337,309 | 1,72 |
| UPSI | 459,520 | 70 | 20 | 1359,352 | 0,34 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 303,083 | | | 190,078 | 1,59 |
| MATHØGGUSLOKKUR | 289,163 | | | 211,977 | 1,36 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 198,106 | | | 3,589 | 55,20 |
| HAVTASKA | 194,675 | | | 67,535 | 2,88 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 103,423 | | | 97,403 | 1,06 |
| GLÝSUFISKUR | 93,542 | | | 85,522 | 1,09 |
| SKRUBBHÁVUR | 89,542 | | | 0,000 | |
| SILVURMURTUR | 82,692 | | | 52,248 | 1,58 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 75,782 | | | 29,680 | 2,55 |
| BROSMA | 70,930 | 9 | | 3,380 | 20,99 |
| KNURRHANI | 53,523 | | | 279,391 | 0,19 |
| GLASKVOYSA | 35,875 | | | 53,140 | 0,68 |
| TUNGA | 33,690 | | | 25,712 | 1,31 |
| ROSSAMAKRELUR | 21,141 | | | 49,695 | 0,43 |
| SKØTA(BATIS) | 19,400 | | | 0,000 | |
| SKADDUR FISKUR | 18,236 | | | 0,000 | |
| KORALL LOPHELIA | 14,200 | | | 0,000 | |
| REYÐI KNURRHANI | 13,787 | | | 20,357 | 0,68 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 10,664 | | | 74,488 | 0,14 |
| BLETTUTA SKØTA | 9,550 | | | 0,000 | |
| HVALSPÝGGJ | 8,802 | | | 1,465 | 6,01 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 7,868 | | | 3,523 | 2,23 |
| IGULKER ECHINIDAE | 5,790 | | | 0,000 | |
| NEBBASKØTA | 5,550 | | | 3,245 | 1,71 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 4,606 | | | 2,670 | 1,73 |
| BLÁLONGA | 3,575 | 3 | | 0,610 | 5,86 |
| SJÓNOTA | 3,338 | | | 0,000 | |
| SKRAMBUL | 2,370 | | | 6,653 | 0,36 |
| IGULKER PURPUR | 0,909 | | | 0,000 | |
| NEBBASILD | 0,302 | | | 2,700 | 0,11 |
| SILD | 0,299 | | | 0,000 | |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0,005 | | | 0,000 | |
| TILSAMANS | 44845,278 | 795 | 190 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski, hýsu, longu og upsa per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.




Mynd 2. Nøgd av tungu, havtasku, mathøgguslokki og gulllaksi per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.




Mynd 3. Nøgd av silvurmurti og glýsufiski per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1938d.doc”.



Petur Steingrund